# Skrivstovufólk til Tinglýsingarstovuna

Søkt verður eftir tveimum skrivstovufólkum, einum til fulla tíð og einum til niðurstta tíð (20 tímar), at byrja skjótast til ber.

**Uppgávur**
Fulltíðarstarvið fevnir í høvuðsheitum um at skráseta í tinglýsingarskipanini og í fíggjarstýringarskipan landsins (FSL), umframt at hjálpa til við øðrum uppgávum á stovninum.
Starvið við niðursettari tíð fevnir í høvuðsheitum um at skráseta innkomin skjøl og føra kassan, umframt at hjálpa til við øðrum uppgávum á stovninum.

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

Umsøkjarar til fulltíðarstarvið skulu harumframt duga at arbeiða við fíggjarstýringarskipan landsins (FSL).

Umsøkjarar til hitt starvið skulu duga at arbeiða við kassaroknskapi.

**Løn og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Monu Wang, leiðara, tlf. 314503.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast

**Tinglýsingarstovuni**
Undir Glaðsheyggi 14
Postboks 89
FO-110 Tórshavn

og skulu vera Tinglýsingarstovuni í hendi í seinasta lagi 23. juni 2006, kl. 12.00.



TIL SØLU
ELLA LEIGU



Um hóskandi boð fæst selja vit sethús okkara við Grønlandsvegin 42 í Tórshavn.

Øll húsini eru innrættaði og væl hildin.
Húsini liggja sera væl fyri.

Umhvørvið er veðurgott, friðarligt og stutt er oman í miðbýðin.

***meira fæst at vita á***
**tlf 22 80 90 ella jpj@nordcar.fo**

MIÐVÁGS KOMMUNA

## Miðvágs kommuna søkir
# námsfrøðingar og hjálparfólk
## til frítíðaransingina

Søkt verður eftir tveimum námsfrøðingum og einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar, at byrja 14. august 2006 ella eftir avtalu.

Frítíðaransingin hevur 2 ár á baki, og halda vit til í hølunum hjá Filadelfia í Miðvági tætt við fótbóltsvøllin, sandin og vøkru Viðalundina á Tungu.

Har er í løtuni pláss fyri 17 børnum.

**Námsfrøðingar:** Væntað verður, at tann ið søkir, hevur lokið námsfrøðiliga útbúgving, hevur fakligan dugnaskap, hug og hegni at arbeiða við børnum og dugir væl at samskifta og samstarva, og í tøttum samstarvi við leiðslu og starvsfólk, vil verða við til at skipa fyri einum mennandi og stimbrandi gerandisdegi fyri børnini.

**Hjálparfólk:** Væntað verður, at tann ið søkir hevur góð samstarvsevni, hug og hegni at arbeiða við børnum, og í tøttum samstarvi við leiðslu og starvsfólk, vil verða við til at skipa fyri einum mennandi og stimbrandi gerandisdegi fyri børnini.

**Lønar- og setanartreytir**
størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í Frítíðaransingini, á tel. 229446.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum, merkt »umsókn« skulu sendast til.

**Frítíðaransingin í Miðvági**
Miðvágs Kommuna
370 Miðvágur

**Umsóknarfreistin** er týsdagin 4. juli 2006 kl. 12.

# Hús í Klaksvík til sølu

Um nóg gott boð fæst, eru sethúsini á Vágsgeil 5 til sølu.

Grundøki er uml. 300 fermetrar til støddar.

Sethúsini eru í 2 innrættaðum hæddum á ca 80 fermetrar hvør hædd.

**Tlf. 455626 ella 275426**

MIÐVÁGS KOMMUNA

## Miðvágs kommuna søkir
# námsfrøðingar og hjálparfólk
## til útibarnagarð á Vatnsoyrum

Søkt verður eftir tveimum námsfrøðingum og einum hjálparfólki at arbeiða ávíkavist 35, 30 og 25 tímar, at byrja 1. august 2006 ella eftir avtalu.

Í útibarnagarðsstovuni koma at ganga 15 børn, sum skulu halda til í hølum og frálíku náttúruni á Vatnsoyrum.

Børn og starvsfólk ferðast við bussi frá Frítíðaransingini í Miðvági har børnini verða avleveraði fyrrapart og avheintaði seinnapart.

**Námsfrøðingar:** Væntað verður, at tann ið søkir, hevur lokið námsfrøðiliga útbúgving, hevur fakligan dugnaskap, hug og hegni at arbeiða við børnum og dugir væl at samskifta og samstarva, í tøttum samstarvi við leiðslu og starvsfólk, vil verða við til at skipa fyri einum mennandi og stimbrandi gerandisdegi fyri børnini, og er sinnaður at brúka náttúruna sum natúrligan part av arbeiðinum.

**Hjálparfólk:** Væntað verður, at tann ið søkir hevur góð samstarvsevni, hug og hegni at arbeiða við børnum, og í tøttum samstarvi við leiðslu og starvsfólk, vil verða við til at skipa fyri einum mennandi og stimbrandi gerandisdegi fyri børnini, og er sinnaður at brúka náttúruna sum natúrligan part av arbeiðinum.

**Lønar- og setanartreytir**
størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í Frítíðaransingini, á tel. 229446.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum, merkt »umsókn«, skulu sendast til.

**Frítíðaransingin í Miðvági**
Miðvágs Kommuna
370 Miðvágur

**Umsóknarfreistin** er týsdagin 4. juli 2006 kl. 12.

# Jørð í Gásadali til sølu

Hervið vera 2 gyllin jørð (matr. nr. 30) í Gásadali, Ryggsvíkin, seld, um hóskandi boð fæst. Hervið fylgir eitt stykki innangarðs við, sum er 494 m$^2$.

Áhugað kunnu ringja á

**tlf. 327130 ella 281130**
**helst aftaná kl. 18.00**